# 2003



8. MAI: Norðurlandahúsið verður 20 ár. Næsta uppgávan hjá Norðurlandahúsinum verður í størri mun at fáa onnur uppí at draga línuna saman við húsinum. Hetta kundi verið vinnulívið og ymiskir grunnar, sigur Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum.



20. MAI: Øll arbeiðarafeløgini hava verið í verkfallií eina viku, og nú merkist verkfallið av álvara. Hillarnar í handlunum eru tómar, og bensinið er farið at ganga undan. Verkfallið varir ein mánað, og gevur verkafólkunum 8,60 kr. upp á tímalønina yvir tvey ár.



27. JUNI: Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, vitjar í Føroyum. Anfinn Kallsberg, løgmaður og forsætisráðharrin undirskriva eitt skjal, sum staðfestir, at møguligt skal vera hjá føroyingum at yvirtaka øll málsøki, sum Løgtingið vil.



4. JULI: Meðan 10 løgreglufólk hósnáttina kringseta eini hús í Vesturbýnum í Havn, har ein maður skjýtur við eini »pump-gun«, loypur ein annar óður maður á politistøðina í Havn, har hann brýtur seks stórar rútar og ger seg inn á portrið, áðrenn hann verður handtikin



23. JULI: Mánakvøldið kemur nýggi flakatrolarin, Skálaberg, hjá JFK Trol, flaggskrýddur á Klaksvík. Saman við stásiliga skipinum, siglir stórt bátafylgi inn móti bryggjuni




11. JULI: Føroya besta arbeiðspláss! Hetta er ein stórur heiður, sigur Albert Ellefsen, stjóri á Fiskavirking í Miðvági, sum arbeiðarafeløgini hava kosið sum ársins arbeiðspláss 2003. Virkið fær toppkarakter fyri m. a. trivna og trygd.



7. AUGUST: Í fleiri dagar verður leitað eftir Poul Aakjær á Tvøroyri, sum er farin í fjøllini við tjaldi. – At liggja í tjaldi í tveir dagar uttan mat var óbehagiligt. Men eg ánaði ikki, at nakar leitaði eftir mær. Eg helt, at øll vóru í brúdleypi, sigur hann, eftir at hann er afturkomin í øllum góðum eftir seks dagar í fjøllunum.